# Boringin í Lopra 1996

*Vísindaliga boringin í Lopra í 1996 varð framd av 19 oljufeløgum, sum ynsktu upplýsingar um hvørji grótsløg eru undir føroyska basaltinum*

*Lis Mortensen*



Tann 13. juli 1996 varð farið undir at dýpa boriholið í Lopra, sum í 1981 varð borað niður til 2178 m. Tað vóru 19 altjóða oljufeløg, sum høvdu tikið seg saman um verkætlanina í Lopra. Verkleiðari (operatørur) fyri boringina var danska oljufelagið Dopas. Í november steðgaði arbeiðið, og boriholið varð tá íalt 3560 metrar djúpt. Boringin kostaði teim luttakandi feløgunum umleið 45 milliónir krónur.

Boringin í Lopra var ein vísindalig boring, har endamálið var at fáa til vega størri vitan um jarðfrøðiligu tilgongdina í føroysku undirgrundini. Endamálið var sostatt ikki at ávísa olju ella natúrgass, men heldur at fáa eina størri vitan um, hvat finst undir føroyska basaltinum.

Jarðalisfrøðiligar kanningar benda á, at tilfar við meginlandauppruna er undir tí føroyska basaltinum. Hetta hevur vakt ans millum vísindaligar stovnar og oljufeløg, sum spyrja seg sjálvi, hvat man vera undir basaltinum. Fara vit her at finna jarðløg, sum kunnu innihalda olju ella gass?

Smáar leivdir av natúrgassi hava seyrað inn í boriholið í Lopra frá 1981, og kanningar av gassinum vístu, at talan var ikki um gass frá kolinum í Suðuroy. Hetta kann vera ábending um djúpari jarðløg, sum kunnu innihalda olju ella gass.

Tá rakt varð við stórar oljukeldur á bretskum øki tætt við føroyska markið, vaks áhugin millum oljufeløg fyri at fáa staðfest, hvat liggur undir basaltinum í Føroyum. Í oktober 1995 bjóðaðu føroysku myndugleikarnir oljufeløgum at fíggja og skipa fyri dýping av boriholinum í Lopra, og við Dopas sum verkleiðara fór arbeiðið í gongd í juli 1996.

Boringin í Lopra varð rakt av nógvum tekniskum trupulleikum. Valt var at bora víðari í boriholinum frá 1981. Hetta hol var trongt, og vandin fyri at typpa holið var tí stórur. Basalt er trupult at bora í, tí tað er so hart, og sjálv boringin gekk tí ikki so skjótt sum upprunaliga ætlað. Tá ein tíð var farin setti boristrongurin seg fastan í holið og avgjørt varð at halda fram við síðuna av fast skoraða boristronginum. Í november mánaði varð umsíður avgjørt, at boringin skuldi steðga á einum dýpi næstan 1400 metrar undir botninum av gamla boriholinum.

Boriholið í Lopra er tað higartil djúpasta í føroysku undirgrundini, og úrslitini av boringini, sum í hesi løtu verða tulkaði av teim luttakandi oljufeløgunum, kunnu fáa avgerandi týdning fyri framhaldandi oljuleiting á føroyskum øki.

Les meira: Deep Drilling, 1981

Lis Mortensen er natúrgeografur og starvast á Jarðfrøðisavninum.



**Luttakandi oljufeløg í boriverkætlanini**

| | |
|---|---|
| Amerada Hess bólkurin: | Amerada Hess Ltd |
| | Dansk Olie og Naturgas A/S (DONG) |
| | LASMO (ULX) Ltd |
| | Norsk Hydro a/s |
| Atlantic Margin Group: | Enterprise Oil Exploration Ltd |
| | Mobil North Sea Ltd |
| | Statoil Efterforskning og Produktion A/S |

Amoco Denmark Exploratation Company
ARCO British Ltd
BHP Petroleum (Exploration and Production Ltd)
British Gas Exploration and Production Ltd
BP Exploration Operating Company Ltd
Chevron Europe Ltd
Deminex UK Oil and Gas Ltd
Esso Exploration and Production UK Ltd
Fina Research S A
Philips Petroleum Company United Kingdom Ltd
Saga Petroleum International A/S
Shell Exploration B V